Fylgiskjal 5

*Hvítanes 27. februar 2020*

**Løgmansskrivstovan**

Viðvíkjandi broytingum í vápnalógini.

Skjótisamband Føroya takkar fyri møguleikan, at gera viðmerkingar til ætlaðu broytingina í vápnalógini.

Á næstu síðu, eru okkara viðmerkingar til broytingina.

Esmar Joensen

Skjóisamband Føroya
Esmar Joensen
Formaður

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skjotisamband@gmail.com
http://skot.fo

**Generelt**

Skjótisambandið fegnast um, at stig verða tikin, sum kunnu lætta um hjá bæði myndugleika og skjúttum, tá hesir skulu ferðast uttanlands til kappingar ella venjingarlegur, og hava sínar byrsur við. Tað hevur alstóran týdning fyri byrsuskjótingina sum ítróttargrein, og við alsamt vaksandi altjóða luttøku frá okkara síðu, at hesi viðurskiftini verða bøtt. Skjótisambandið hevur leingi ynskt, at skipanin við ES-vápnapassi eisini bleiv sett í gildi her, eins og í eitt nú Noregi; men sum skilst á Løgmansskrivstovuni letur hetta seg ikki gera í bræði. Skjótisambandið fegnast tí kortini um, at Løgmansskrivstovan nú tekur stig til ábøtur, har møguleiki verður at gera eitt føroyskt vápnapass.

Tað hevur alstóran týdning fyri okkara ítróttarvirksemið uttanlands, at vit hava eitt pass, har navnið á skjúttanum, helst við mynd, og bæði slag og seriunummar á byrsuni er áteknað. Hesi pass skulu gjarna eisini verða orðað á enskum máli, tí vit røkka ikki so langt út um landoddarnar við føroyska vápnaloyvinum, sum nú er galdandi. Ikki tí, at verandi vápnaloyvi er ein fín skipan at nýta her á landi, og hendan lættir eisini munandi um í ítróttarhøpi, tá vit fáa nýggjar skjúttar á breytir okkara og kunnu staðfesta, at hesir hava vápnaprógv við trygdarskeiði.

Vit loyva okkum at viðleggja uppskot til, hvat vit meta krevst av einum føroyskum vápnapassi, at nýta í sambandi við ferðing uttanlands. Sí uppskot seinast í hesum brævið.

**Innihald**

Skjótisambandið tekur undir við broytingini í § 1, men skal samstundis loyva sær at vísa á, at hetta at ”flyta út” byrsur kann hava tvinnar týdningar sum í ”útflutningur” og at ”ferðast við”, og at tørvur er á báðum.

Hetta skal bæði fevna um, at ein skjútti fer uttanlands til kappingar ella venjingarlegu, og hevur byrsuna við sær á ferðini út og heimaftur. Hin støðan er, at ein skjútti flytur av landinum, t.d. í lestrarørindum, og hevur byrsuna við sær, soleiðis at hann framhaldandi kann fáast við sína ítróttargrein, meðan hann er burturstaddur. Ein onnur líknandi støða kann vera, at ein skjútti selur byrsu sína til onkran útlendskan ítróttaskjútta, og at byrsan í hesum sambandi fer av landinum. Havast skal í huga, at ítróttabyrsurnar oftast eru munandi dýrari enn vanligar byrsur, og at tørvur kann vera á, at skjúttin selur gomlu byrsu sína aftur, tá hann ognar sær eina nýggja. Marknaðurin fyri hesum sølum er sera avmarkaður í Føroyum, og tí kann talan gerast um, at byrsan verður latin inn til forhandlaran, sum selur skjúttanum nýggju byrsuna, ella at hendan verður seld persónliga í ítróttarumhvørvinum.

Heitt verður á Løgmansskrivstovuna um at gera tað púra greitt í uppskotinum, at talan er um báðar hesar støðurnar.

Samstundis skal verða víst á, at tá talan er um loyvi til at ferðast uttanlands við byrsum, eigur tað at vera eitt krav fyri hesum loyvi, at skjúttin hevur staðið vápnatrygdarskeið, tvs. hevur vápnaloyvi við vápnatrygdarskeiði sambært § 3 b ella § 3 g í lógini. Havandi í huga alsamt truplari støðuna at ferðast við vápnum og herdu krøvini til handfaring av hesum úti í heimi, kann Skjótisambandið ikki viðmæla, at fólk við vápnaprógvi uttan vápnatrygdarskeið, skulu kunnu ferðast við hesum vápnum uttanlands. Hetta vildi verið eitt keðiligt signal at sent umheiminum, um vit skulu fáa okkara skipan viðurkenda

uttanfyri landoddarnar. Er talan um ítróttarskjóting kundi ein møguleiki verið, at Skjótisambandið segði gott fyri skjúttanum í sambandi við, at loyvi verður givið.

Hetta eigur tó ikki at forða fyri, at fólk uttan vápnatrygdarskeið kunnu flyta út eina byrsu, um hendan t.d. skal seljast ella sendast til umvæling hjá vápnasmiði uttanlands.

**Málsligt**

Í galdandi lóg verður bæði tosað um ”høglbyrsur”, ”haglbyrsur” og ”haglpatrónir”. Skjótisambandið mælir til at rætta hetta upp. Rætta heitið er ”høglbyrsa/ur” og ”høglpatrónir”. Hugsandi er, at haglbyrsa og haglpatrón er ein “danisma”, sum er komin inn í lógina við støði í donsku heitunum fyri hesum.

**Uppskot til hvat skal standa á einum komandi føroyskum vápnapassi**

| **Tekstur** | **Dømi** |
|---|---|
| Yvirskrift | Faroe Islands (FRO)<br>Firearms Passport |
| Merkið |  |
| Eintýðugt raðtal. Møguliga endurnýta sama raðtal, ið Umhvørvisstovan brúkar í dag, í teirra prógv skrá | 1234 |
| Útskrivað dagfesting og gildistíð | Date issued: 1. January 2020<br>Valid until: 31. Desember 2025 |
| Samleiki hjá eigara, somu upplýsingar sum á persónsferðapassi<br><br>Navn<br>Bústaður<br>Bygd/bý<br>Føðingardagur | <br><br><br>Jens Hansen<br>Millum Garðarnar 1<br>FO-700 Klaksvík<br>1. January 1980 |
| Andlitsmynd |  |
| Undirskrift hjá eigara |  |

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skjotisamband@gmail.com
http://skot.fo

| | |
|---|---|
| Byrsur ið loyvi umfatar.<br>Framleiðari, merki, kalibur og seriunummar | Beretta 682 Gold - 12 cal - H21524B<br>Browning 525 sport – 12 cal - 54714ZW |
| Stempul, búmerki ella vatnmerki hjá føroyska myndugleikanum, ið útskrivar pass | |
| Undirskrift hjá myndugleika, ið útskrivar pass | |

**Skitsa til pass í gjaldskort stødd**

Framsíða

**Faroe Islands (FRO)**
**Firearms Passport**

**Pass number:** 1234
**Date issued:** 1. January 2020
**Valid until:** 31. December 2025



**Name:** >Sama sum á persónspassinum<
**Address:** >Bústaður<
**City:** >FO-000 Bygd/bý<
**Date of birth:** >01. January 1980<
**Holders signature:**

Baksíða

**Particulars of Firearms**
Beretta 682 Gold - 12 cal - H21524B
Browning 525 sport – 12 cal - 54714ZW
...
..
.

**National Weapons Permit Authoity**
Navn: t.d. Umhvørvisstovan